Kunningarskriv viðv. setursskúlanum 13.05 - 15.05.2025.

Góðu næmingar og foreldur í 7. flokki

Í døgunum 13. til 15. mai fara vit á setursskúla í leguhúsinum í Nesvík. Vit møta í skúlanum týsdagin kl 8.30 og fara frá Nesvík aftur hósdagin kl 9.30.

Skúlin rindar fyri ferðing og gisting. Tær 200 kr tit hava goldið, eru fyri mat o.a.

Í Nesvík eru góðar umstøður at vera úti, so tí er umráðandi, at øll hava hóskandi klæðir og skógvar við.

Eisini muga tit hava nokk av skiftiklæðum við. Øll skulu undir brúsu minst einaferð um dagin 😊 So minnist til rein klæðir og deodorant.

Annað at taka við:

- Seingjarklæði ella soviposa
- Seingjarlak
- Handklæði
- Borðspøl o.a.
- Lummapening
    - Tit verða biðin um ikki at keypa orkudrykkir.

Mint verður annars á, at vanligir reglar eru galdandi, og vit fara av avmarkað brúkið av telefonum og tílíkum.

Um nakar er, ið tekur heilivág ella er viðkvæmur yvir onkrum, muga tit boða lærarunum frá.

Eru spurningar ella eitthvørt, ið tit annars vilja boða okkum frá, eru tit vælkomin at senda okkum boð.

Við setursskúlakvøðu

Toymið í 7. flokki